Viðmerkingar frá Tvøroyrar Sosialdemokratiska felag

Í Oyggjatíðindi og 14. september næstseinasta vikuskiftið, royndi Dánjal av Rana at bera fram ósannar pástandir um ymisk politisk viðurskifti her á Tvøroyri, og um tilknýtið hjá Tvøroyrar Sosialdemokratiska Felag til Føroya Javnaðarflokk. Hetta var ikki óvæntandi, ja satt at siga eru fólk flest vorðin von við slíkt. Men óvæntandi var hóast alt, at úttalilsir hansara bera sterkan dám av frustratión. Ei undur í.

Vit vilja ikki leingja óneyðugt um hetta tråkjakaða evnið, tí vit meta, at Dánjal av Rana og hansara menn bert royna at halda lív í hesum kjaki í vónloysisøði. Tí bert nakrar definitivar viðmerkingar.

1. Sambært lóg Føroya Javnaðarfloks eru øll javnaðarfeløg í Føroyum limir í flokkinum. Tí er Tvøroyrar Sosialdemokratiska Felag limur.

2. Á landsfundinum í vár var Tvøroyrar Sosialdemokratiska Felag umboðað og hevði atkvøðurætt á jøvnum føti við onnur feløg. Tí er Tvøroyrar Sosialdemokratiska Felag limur.

3. Tvøroyrar Sosialdemokratiska Felag hevur goldið kr. 4.095,- í limagjaldi til Føroya Javnaðarflokk (sí kopi av kvittan). Tí er Tvøroyrar Sosialdemokratiska Felag limur.

Viðvíkjandi uppstillingini er bert stutt at siga. Vit hava virkað fyri, at bert ein listi verður í oynni til løgtingsvalið, og har bæði feløgini á Tvøroyri fáa hvørt sítt valevni.

Viðvíkjandi uppstillingini til komandi býráðsval er at siga. Vit fara ikki á lista saman við hvørki Froðbiar Sóknar Javnaðarfelag ella Dánjal av Rana. Vit gera sjálvandi okkara egna lista. Vit hava ongantíð dult, at talan er um eina lokala ósemju — so uppgerðin skal sjálvsagt eisini verða lokal.

So Dánjal av Rana — tað verður ikki spurningurin um at krúpa til nakran kross — men spurningurin verður hvør ið fær krossarnar.


PARTAFELAGID
FØROYA BANKI
KVITTAN
at góðskriva
Føroya Javnaðarflokk
vegna limagjald
TVØR TVØROYRAR SOC.DEMOKR. FELAG
C/O FR. AN Y MORTENSEN
3800 TVØROYRI
FØROYA SPARIKASSI
POSTBOX 34
3800 TÓRSHAVN
PARTAFELAGID FØROYA BANKI
Óli Dein
210384 356 0029 1129 6450 06 497044 4.095,00- FLT
210384 356 0030 1129 6450 07 075063 4.095,00+ FLT
DAGF KONTONUMMAR UPPHÆDD TEKSTUR

Tvøroyrar Sosial demokratiska Felag
v/ Jóannes Eidesgaard

---

fjasast uppi í politikki í 8 ár. Um so er, so hevur byrjanin hjá honum verið sera vánalig og onki annað enn fjas, tí felagið var í 1953 komið á gravarbakkan (fundur var hildin til endurreisan) og vinnuliga var ikki betur statt. Tá var munur á støðuni í 1981 tá hann kom suður og troðkaði meg úr formanssessinum. Felagið hevði fáar mánaðar framman undan havt sítt besta valúrslit við 748 atkvøðum, og á vinnuliga økinum var ognarrætturin til framleiðslutólini fyri stóran part fólksins, sjálvt um onnur enn fólksins valdu umboð hava evsta valdið í hendi. Spell at fjalsið og ólevnaðurin frá árunum 45/53 skuldi sleppa at gera um seg aftur, nú tá vit lógu so væl á takinum. Síðani 1970, tá Atli Dam troðkaði Øregaard, sála, úr formanssessinum, hevur eisini sama fjasuta lagið gjørt vart við seg. Í hesum tíðarskeiði er undirtøkan, sum flokkurin hevði úti um landið, minkað úr 30 niður í 22%.

Atli Dam ger gjøldur burturúr starvi mínum sum stjóri fyri løngjaldstovuni, uttan at gera sær greitt, at hann samstundis dálkar minnið um sín egna faðir, tí enn í dag liva á mannamunni orðini hjá tvørámanninum, tá hann ein dagin í januar mánaða í 1934 møtti P. M. Dam, sála, við hesum orðunum: »O, Dam, Dam, hetta var ein vælgerð, at tú skaffaði okkum løngjaldstovuna. Nú sleppa vit frá at bidda arbeiðsgevaran um tann pening, ið vit hava sveittað og stríðst fyri«. Fyri teir báðar var hetta meira enn peningur og konvoluttar, nevniliga frælsi at taka ímóti og ráða sjálvur yvir síni egnu løn.

Annars hevur vanliga áskoðanin verið hon, at løngjaldstovurnar hava lætt um arbeiðið hjá arbeiðsgevarunum. At Atli Dam hevur aðra áskoðan, undrar ikki meg. Hann hevur so við og við funnið sær sess hinumegin borðið, millum vælgøddar bossar í nýggju yvirstættini og samstundis megnað at leggja sjógv millum seg og verkafólkið við tess leiðarum. So sanniliga ein verdug støða at vera komin í hjá einum javnaðarforðingi.

Viðvíkjandi løn míni sammett við stjórans á Tvøroyrar Flakavirki er at siga, at løn mín fyri juni mánaða var kr. 11.265,- ímóti flakavirkisstjórans, ið telur fleiri og tredivu túsund um mánaðan — umframt kr. 108.000,- árliga í ferðaútreiðslum.

Brikslið um politiskar brotsgerðir og skuldseting um yvirtrekk fyri at vinna atkvøður taki eg lætt, tí hetta er ein partur av fjasi og ólevnað Atla og avdúkar ringu muruna, sum í honum er. Kortini ivist eg í, um Atli Dam er tann rætti maðurin at briksla øðrum yvirtrekk, tí í Útvarpinum nú ein dagin varð uppaftur tikin skuldsetingin um, at tá Atli Dam legði frá sær sum løgmaður, var yvirtrekkið 1/2 milliard niðan fyri botnin í landskassanum.

Enn er fíggjarætlanin hjá Tvøroyrar Býráð ikki samtykt, av góðum grundum, men í tí uppskoti, sum fyriliggur, eru veitingarnar til teknisku nevnd broyttar munandi; t.d. síggja niðanfyrinevndu konti soleiðis út:

Byggibúning	0
Vegabreiðkan	0
Ognarkeyp	0
Býarhegn	0
Rakstur av bili	0

og tað sum verri er, er at ídnaðarkontoin, sum seinastu 12 árini hevur verið 1% av álíkningini (í ár 1,2 milliónir) eisini er 0 stillað. Spurningurin er so bert, um støðan er so vánalig, at ikki eru ráð til at nøkta hesi livsneyðugu krøv, ella talan er um eina fellu fyri at kunna vísa á yvirtrekk. Í báðum førum er talan um óhugna av ringasta slag.

Flokspolitiskt stríð er ikki nakað fremmant fyribrigdi, heldur ikki her á landi. Stutt áðrenn P. F. Joensen skald doyði, yrkti hann um royndir sínar av sjálvstýrisrørsluni í Føroyum soljóðandi:

....«Hvørja ferð málið í eygsjón var, oddafiskarnir svíktu.«

Spell at hetta eisini skuldi verða okkum í javnaðarflokkinum fyri.

D. av Rana

70 ár

Í dag, 28. juli, sjálvan Ólavsøkuaftan verður ein kend Nólsoyarkona sjeyti.

Mina, sum hon verður nevnd í bygdini, skrivast Vang Hansen, sum tey gomlu søgdu tað.

Foreldur hennara vóru Jákup Vang úr Kálvhúsinum á Glyvrum og Inga úr Garði í Nólsoy.

Tey fyrstu barnaárini búðu tey á Glyvrum, men tá Mina var 5 ára gomul, fluttu tey til Nólsoyar og hevur Mina síðani verið á oynni at kalla alla sína tíð.

Har hevur hon tikið lut í øllum tí, sum fyriferst í eini føroyskari bygd, í gerandislívinum sum aðrar tíðir, so sum lívið hevur verið í tí føroysku bygdini.

Á yngri árum tænti Mina eitt skifti í Havn, hjá so mætum fólkum sum hjúnunum Petru og Hans Andriasi, skaldi, og hjá teimum í Stórustovu. Frá hesi tíðini hevur Mina mangt gott og minnisríkt at fortelja og at minnast afturá.

Í 1936 giftust Mina og Erling — og síðani var Mina húsmóðir, aldi upp børnini, 3 eru tey í tali, men har í húsinum vóru tey ofta fleiri enn júst húsfólkið, tí var ein hjálpandi hond tiltrongd, so stóðu dyrnar altíð opnar.

Sum sjómaður var Erling javnan burturi, hann var stýrimaður við »Jóannes Patursson« í mong ár, og tá var tað ábyrgdin hjá Minu at taka sær av øllum sum fyrifórst heima, inni sum úti, so sum luturin hjá mangari føroyskari húsmóður framvegis er.

Hevur Mina verið Erlingi ein góður stuðul gjøgnum árini, so hevur hon eisini sýnt sín samfelagsáhuga og støðufesti á annan hátt.

Mina er avhaldskvinna. Hon er næstformaður í tí 90 ára gamla Nólsoyar Avhaldsfelag; hon var eitt skifti formaður, og hevur tað verið eitthvørt til frama fyri Avhaldshúsið og felagsmál, ja so hevur Mina altíð verið tilreiðar.

Mong hava sitið væl hjá Minu og Erlingi og senda blíðar heilsur á sjeyti ára føðingardegnum og ynskja teimum ein hugnaligan dag; løgið skal vera um børnini ikki øll eru komin heim, hóast teinurin kann vera langur.

Vit ynskja Minu Hjartaliga tillukku við teim 70.

I.